# sen tikin á bóli

Tað, sum kom óvart á hana fríggjamorgunin var, at næstringar og vinfólk tóku ræðið á degnum hjá henni og manninum og førdu tey runt í Havnini á motorsúkklu, hestbaki og bili.

Dagurin byrjaði klokkan níggju, tá ið ein riðil av fólki gjørdu innrás heima hjá Anniku við morgunmati.

Eftir tað kom bilur eftir teimum og koyrdu tey niðan á Hotel Føroyar, har tvey saðlað ross stóru fyri teimum og førdu tey ein túr út í Havnardal, greiðir systirdótturin, Bjørk Olsen, frá.

Afturkomin stóðu tvær motorsúkklur fyri teimum og koyrdu tey runt í Havnini, og líka til Oyragjáar, áðrenn tey stevndu suðuraftur til Havnar og oman í Vágsbotn, har kokkurin á Toscana hevði borðreitt við hvítum dúki, rósum og einari lættari máltíð og har sótu tey so til almenna framsýning beint undir føroysku tjóðarhetjuni, Nólsoyar Pálli ímeðan Sigrid Rasmussen spældi bleytar tónar á violin fyri teimum.

Aftaná kom bilur eftir teimum og koyrdu tey í svimjihøllina, har tey sleppa at hvíla seg eina løtu í gosbaði, men so er tað beint á hvør sína traðkisúkklu oman í kommunuskúlan, har dvd við dansiskeiði verður settur frá og har skulu tey so læra seg at dansa – ikki brúðarvalsmen cha cha.

Í kvøld savnast tey so heima hjá bróðrinum Martini Karl, har stór veitsla verður í kvøld.

Sjálv brúdleypsveitslan verður í HB húsinum fyri innbodnum.


RINGIÐ TEL 312 000 OG FÁIÐ EITT ÓBINDANDI TILBOÐ





CTC-vørumerkið er vælkent hjá føroyingum. Við meira enn 50 árum á føroyska marknaðinum nýtist ikki at siga meira...

Tygum fáa CTC-hitapumpuna hjá Mariu Poulsen.

CTC

Maria Poulsen

Tel 312 000 | Fax 315 970 | mp@mp.fo | www.mp.fo










**KIA Picanto**

Tann higartil minsti frá Kia á føroyska marknaðinum. Lítil, men rúmligur og avbera vælútgjørdur. Hetta er stóri orkuspararin, sum koyrir langt uppá liturin og við t.d. ESP sum standard er hann ein av tryggastu bilum í sínum flokki. Hetta er t.d. mest seldi Kia bilurin í Englandi. Í Føroyum fæst hann við tveimum smáum bensinmotorum við 1000 ella 1100 cc, ella við einum 1.1 diesel.

**úr kr. 124.800**



Kia Rio úr kr. 159.800



Kia Magentis úr kr. 224.800



Kia Rio úr kr. 256.800



Kia Ceed úr kr. 184.800



Kia Sportage úr kr. 270.800



Kia Sorento úr kr. 375.800

# Kia – millum heimsins fremstu bilaframleiðarar

Kia Motors hevur bygt sína egnu bilverksmiðju í Evropa og floymir nú yvir evropeiska marknaðin við rúkandi ferð. Talan er um eina bilverksmiðju, sum hevur stórar ætlanir í Evropa. Verksmiðjan er ein tann mest framkomna í øllum heiminum, og í 2007 tóku teir allan bilaídnaðin á bóli við at geva heilt upp til 7-ára garanti upp á sínar bilar. Málsetningurin hjá Kia Motors er heilt greiður. Teir skulu verða millum heimsins størstu bilframleiðararnar.

BM BERG MOTORS

Staravegur 1-3 · FO-100 Tórshavn · tel 31 35 35 · fax 31 77 35
Stoksoyrarvegur 8 · 700 Klaksvík · tel 45 74 74 · fax 45 74 11
info@bm.fo · www.bm.fo